## Róðrarveitsla á Rex

Kappróðrarárið 2006 endar fríggjadagin um fimm tíðina, tá 10-mannaførini fara fyri seinastu fer um málið. Bátarnir verða drignir í neystið fyri árið, og rógvarar fara at halda kærkomna ólavsøku eftir eitt strævið róðrarár.

Heimasíðan Drekin.fo fer sum nakað nýtt, at skipa fyri stórari róðrarveitslu sunnudagin á ólavsøku. Kostnaðurin fyri veitsluna er kr. 190 um tú keypir atgongumerki ígjøgnum heimasíðuna. Tú kann eisini keypa atgongumerkir eftir 10-mannafarsróðurin á ólavsøku, men tá er kostnaðurin kr. 240.

Veitslan byrjar klokkan 23:00 sunnukvøldið og varir so leingi fólk orka.

Seinasta freist at keypa atgongumerki ígjøgnum heimasíðuna er hósdagin á midnátt.

## Úttøkukapping til NM-róður

Róðrarsambandið hevur nú gjørt av, hvussu berast skal í bandi, tá bestu føroysku innandurarógvararnir skulu finnast.

Drekin.fo veit at siga, at skipað verður fyri serstakari innandurakapping í vetur, har bestu rógvararnir kunnu vinna sær pláss í norðurlendsku kappingini. Íalt hava Føroyar fingið átta pláss í kappingini, og lítil ivi er um, at hetta verður stór gularót hjá sterkastu føroysku rógvarunum, nú uttandurarógvingin fer í hálvt ára frí eftir ólavsøkuna.

**-mørk**



mynd: www.drekin.fo

# Startrøðin á ólavsøku



**Seinasti FM-róðurin stendur fyri framman, og hóast nakrar kappingar longu eru avgjørdar, so er spenningurin enn stórur. Bæði tí enn eru fleiri meistarar eftir at finna, og ikki minst, tí tignin á ólavsøkuróðrinum er somikið stór, at tað nærum er at sammeta við FM.**

**Startrøðin til ymsu róðrarnar er greiðm, og hon verður hendan:**

**5-mannafør, dreingir**
1 Blikur
2 Strípan
3 Havfrúgvin
4 Kollur
5 Ritan
6 Jallurin
7 Sílið
8 Drekin

**6-mannafør, kvinnur**
1 Hvessingur
2 Riddarin
3 Jarnbardur
4 Lómur
5 Smyril

**5-mannafør, gentur**
1 Dúgvan
2 Firvaldur
3 Havfrúgvin
4 Blikur
5 Hvassi
6 Frúgvin
7 Drekin
8 Ørnin
9 Sílið

**5-mannafør, kvinnur**
1 Báran
2 Drekin
3 Junkarin
4 Sílið
5 Ørnin
6 Ritan
7 Jallurin
8 Tjaldrið
9 Blikur

**6-mannafør, menn**
Kollfirðingur
Lómur
Gongurólvur
Hósvíkingur
Sundabáturin
Sølmundur
Jarnbardur
Smyril
Páll Fangi
Víkingur
Árnfjarðarbáturin

**8-mannafør**
1 Nevið Reyða
2 Argjabáturin
3 Knørrur
4 Ørvur

**10-mannafør**
1 Nólsoyingur
2 Havnarbáturin
3 Klaksvíkingur
4 Eysturoyingur
5 Vestmenningur
6 Skálabáturin
7 Vágbingur

# HB-málið avgreitt innan ólavsøku

– Hetta hevur verið sum ein marathon-renning, men nú renna vit seinastu rundurnar inni á sjálvum stadion.

Sammetingin, sum formaðurin í Kappingarnevindini hjá FSF, Høgni í Stórustovu, kemur við, er kanska ikki heilt av leið, nú málið um spæliloyvið hjá Páll M. Joensen er farið um teir fýra mánaðirnar.

Fyri triðu ferð er málið endað í Kappingarnevndini, og hóast formaðurin er staddur uttanlands, so metir hann, at nevndin loksins kann avgreiða málið.

– Eg siti her í góðveðrinum og gjøgnumgangið tey skjøl, sum eru innkomin, nú vit aftur skulu viðgera málið. Tá tað er gjørt, so meti eg, at vit kunnu hava ein telefonfund um málið, og tað verður ætlandi innan ólavsøku. Antin í kvøld ella í morgin, staðfesti Høgni, tá vit í morgun hittu hann á orðið.

Tá málið – vónandi – verður endaliga avgreitt, stendur enn eftir at finna útav, hvussu kappingin um løgmanssteypið skal avgreiðast. Røddir hava róð framundir, at finalan neyvan kann avgreiðast, fyrr enn tað aftur fer at vára, men í løtuni vil Høgni ikki gera stórvegis viðmerkingart til tann spurningin.

– Tað mugu vit taka, tá vit koma hartil, men tað er greitt, at nógvir lutir skulu ganga upp. Nú stendur ein NM-kappingin fyri framman, og umfram hana, so skal atlit eisini takast til Formula-kappingina, sum helst ikki skal órógvast ov nógv. Samstundis mugu vit ansa eftir, at arbeiðið kring A-landsliðið ikki verður órógvað, og so er tað eisini veðrið. Tað kann jú hava sítt at siga, so talan er um eitt stórt putlispæl, sum vit nú mugu fáa at ganga upp, sigur formaðurin í Kappingarnevndini hjá FSF.

**-mørk**

## Katrin hugsar um HM

Meðan flestu heimligu rógvarar helst hava tankarnar vendar móti ólavsøkuni, hugsar Katrin Olsen nakrar vikur longri í so máta. Tann 20. august skal hon nevnliga verða partur av HM-kappingini í rógving, har hon og hinar í danska dupult-fýraranum aftur í ár medda høgt.

Í fjør heyst gjrødist talan fyri fyrstu ferð um heiðursmerki til donsku kvinnumanningina í hesi bátastøddini, og sjálvt staðfestir Katrin, at tær avgjørt ikki ætla, at nakar skal taka heiðursmerkini frá teimum uttan víðari.

– Enn vita vit ikki, hvussu nógvir dupult 4'arar koma til HM. Vónandi koma fleiri enn í Japan, har tað bara vóru 7 bátar. Kinversku kvinnurnar eru nokk tær, sum vit skulu ansa mest eftir. Tær vóru ikki vi› í Japan, men tær vunnu HM í 2003 og 2004, og tær hava staðið seg serstakliga væl í ár í dupult-scullara í Munchen og Poznan. Men vit ræ›ast tær ikki, og ætla ikki at lata tær ella nakran annan sleppa fram við okkum, eru boðini, sum Katrin hevur sent umvegis teldupost.

Í næstum fer Katrin saman við liðfeløgunum á venjingarlegu í Eysturríki, og har er ætlanin, at formurin veruliga skal fínpussast, sigur Katrin, áðrenn hon at enda letur heilsa og ynskir øllum her heima eina góða ólavsøku.

**-mørk**